LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Almannaverkið
Staravegur 18
Postsmoga 3096
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 22. januar 2021
J.Nr.: LUM-10- 20/00125-11
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr. 703.K04-0082/20

**Viðvíkjandi klagumálinum hjá A um langa viðgerðartíð**

Í klaguni frá 22. oktober 2020 greiddi klagarin frá, at í mai 2019 søkti hon Almannaverkið um "daddutímar" til barn sítt, ið ber brek. Daddutímar er stuðulsfyriskipan sambært § 32 c í forsorgarlógini og er fyri børn undir 18 ár, sum tørva stuðulsfólk vegna virkistarn orsakað av likamligum ella sálarligum brek ella víðfevndari sjúku.

Í november 2019 játtaði Almannaverkið klagaranum stuðul til daddutímar, men var játtanin bert galdandi í hálvt ár. Vegna støðuna, ið stóðst av korona, varð játtanin tó seinni longd til 1. juli 2020. Í mai 2020 setti klagarin seg aftur í samband við Almannaverkið fyri at søkja av nýggjum, men fekk klagarin tá at vita, at ikki var neyðugt at søkja umaftur, tí Almannaverkið fór at endurmeta málið í juli, og so skuldi klagarin hoyra aftur frá teimum. Tá klagarin ikki frætti aftur frá Almannaverkinum, spurdi klagarin í tveimum førum Almannaverkið, nær avgerðin kundi væntast. Tann 24. september 2020 fekk klagarin svar, har Almannaverkið játtaði stuðul til daddutímar í hálvt ár, galdandi frá 1. oktober 2020. Tað gingu sostatt meira enn 4 mánaðir frá, at klagarin setti seg í samband við Almannaverkið um framhaldandi stuðul, til játtanin varð avgreidd. Av hesum tíðarskeiði hevði klagarin í 3 mánaðir onga játtan til stuðul til daddutímar, og var tí ikki gjørligt hjá klagaranum at brúka dadduna í hesum tíðarskeiði. Klagarin sigur, at orsøkin til klaguna er langa viðgerðartíðin av eini játtan, ið bert verður játtað hálvt ár í senn, og at tað ikki er møguligt hjá dadduni bara at halda áfram hesar 8 tímarnar um mánaðin, sum játtanin dekkar, meðan Almannaverkið viðgerð játtanina framyvir.

Almannaverkið hevur í frágreiðing til mín, dagfest 16. november 2020, greitt soleiðis frá málinum :

"…

> Almannaverkið ásannar, at hetta málið hevur verið undir viðgerð í ov drúgva tíð, og at hetta er óheppið. Í hesum seinasta føri er talan um, at játtanin endar í juni, og sosialráðgevi vendir sær til familjuna fyrst í juli. Síðan kemur summarfrítíð, umframt at viðkomandi sosialráðgevi fór úr starvi

> og tískil hendir ikki meira fyrrenn 19. august 2020, tá nýggji sosialráðgevin vendir sær til Avgerðarskrivstovuna hjá Almannaverkinum við tilmæli um nýggja játtan.
>
> Væntast má, at slík málsviðgerð tekur uml. 1 mðr., og viðgerðin í hesum føri er sostatt – av nevndu orsøkum – seinkað 3-4 vikur. Somuleiðis hava aðrar umsóknir frá klagara verið undir ov drúgvari málsviðgerð.
>
> Hesi mál um sonevndu daddutímarnar eru heldur øðrvísi enn flestu onnur mál hjá Almannaverkinum soleiðis skilt, at vanliga hava trivnaðartænastur onga endadagfesting, og tískil er vanliga ikki tørvur á at fylgja málum upp við jøvnum tíðarbilum. Daddutímarnir eru einastu málini, ið hava so stutt játtanartíðarskeið – millum 3 og 12 mánaðir hvørja ferð – og har endadagfesting er ásett.
>
> Almannaverkið er varugt við, at hesi mál hava elvt til ávísar avbjóðingar, og tískil er fyri stuttum gjørd nýggj leiðbeining til hetta arbeiðsøkið. Henda leiðbeining er gjørd stutt fyri hetta kærumál, og inniber m.a., at øll mál av hesum salg verða sett í áminning fyrst í tí mánaði, har játtanin endar. Sosialráðgevi skal síðan venda sær til familjuna, fyri at hoyra um tey framhaldandi ynskja at fáa daddutímar. Á henda hátt eigur Almannaverkið at kunna lofta málunum, áðrenn játtanartíðarskeiðið endar. Øll verandi mál um daddutímar eru nú sett í áminning.
>
> Almannaverkið ásannar, at viðgerðartíðin av málinum hjá klagaranum hevur verið ov drúgv, og at henda viðgerðartíð ikki hevur verið nøktandi. Við nýggju mannagongdini væntar Almannaverkið ikki, at slík mál koma fyri aftur, har viðgerðartíðin verður so drúgv sum í hesum klagumáli."

Málsviðgerðin av eini framhaldandi játtan til slíka skipan sum daddutímar, har tað snýr seg um, at barnið / familjan fær praktiska hjálp sum lættir um gerandisdagin, eigur at verða skipað soleiðis, at barnið / familjan, sum hevur tørv á játtanini, hevur eina støðuga játtan, so skipanin ikki steðgar uppi í onkrum tíðarskeiði vegna langa málsviðgerðartíð.

Í førinum hjá klagaranum steðgaði skipanin upp í 3 mánaðir, meðan klagarin bíðaði eftir svari frá Almannaverkinum. Hetta er ikki nøktandi, og haldi eg, at undanførslurnar hjá Almannaverkinum um orsøkirnar til seinkanina vísa, at viðgerðarmannagongdin, sum Almannaverkið hevði fyri slík mál, ikki var í lagi. Eg gevi tí Almannaverkinum eina átalu fyri handfaringina av hesum máli.

Tá Almannaverkið nú hevur broytt sínar mannagongdir, so slík mistøk, sum hend eru í hesum máli, ikki skulu koma fyri aftur, geri eg ikki meira við málið.

Avrit av hesum skrivi er sent klagaranum og verður í næstum lagt á heimasíðu okkara, www.lum.fo, í navnleysum líki.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður